

*Elin og Tróndur vóru veitsluskrýdd og í góðum Nýggjárshýri*

# Nýggjárið í SvF verður ikki fyri børn

**Kynslívið hjá føroyingum, seksleikur og make-over eru nøkur av innsløgunum, ið verða partar av nýggjárssendingini "Í Káta Horninum" hjá Kringvarpinum, ið verður send á Sjónvarp Føroya Nýggjársaftan**

SJÓNVARP
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Nýggjárssendingin hjá Sjónvarpinum í ár verður ikki fyri børn og sartar sálir. Vertirnir Elin í Stórustovu og Tróndur Vatnhamar fara at taka pulsin á tí, ið hevur rørt seg í Føroyum seinasta árið, og pulsurin er høgur. Vit vóru við, tá Sjónvarpið beint fyri jól tók partar av sendingini upp í hølunum hjá Gourmet við Skálatrøð.

Elin og Tróndur vóru veitsluskrýdd og friseraði av einslistum. Elin hevði verið í Vestmanna hjá Royal hárfríðkanarstovuni og longt sær hárið, toppurin og niðurdeilurin eru føroysk sniðgeving, sniðgivin til Elina. Tróndur var í klassiskum svørtum klædningi, og hárið var sum slokt aftureftir. Hann greiddi frá, at hann hevði ætlað sær til hárskera, men tíðin hevði ikki verið til tað, tí var Mafiaútsjóndin ein neyðloysn, men hon klæddi væl til bandittasliga smílið.

Sendingin er eitt samstarv innanfyri Kringvarpið, har Elin umboðar útvarpið og Tróndur og myndakvinnan Bjørg Mohr Andersen umboða sjónvarpið. Hetta er aðru ferð, at Elin umboðar útvarpið á sjónvarpsskíggjanum, fyrru ferðina var í sambandi við Atlantic Music Event, og hon tykist at trívast á skíggjanum.

Elin greiddi okkum frá, at hetta er ein lættisoppasending, eitt slag av Nýggjárspunkti, segði hon, Trónd rópa tað. Tá tey fóru í holt við sendingina, settu tey seg niður og tosaðu um, hvat var hent í árinum, og royndu at viðgera nøkur rák, ið hava verið uppi hetta árið. Burtur úr hesum kom eitt bland av ymiskum stuttligum og eisini onkrum nokkso provokerandi.



*Bjørg Mohr Andersen stóð fyri myndatilfarinum í sendingini*

Elin og Bjørg hava t.d. verið í Danmark og tikið partar av sendingini upp. Tær hava vitja handilin Lust mitt í Keypmannahavn, ið selir seks-leikur og eggjandi undirklæði. Har hava tey práta við tvey av føroysku viðskiftafólkunum og við handilskonuna, um hvat føroyingar plaga at keypa og hvussu tey eru sum viðskiftafólk. Elin sigur, at hugskotið til hetta kemur frá Dildoparty'unum, ið hava verið í ár. Elin luttók á einum av hesum fyri útvarpið fyrr í ár og varð tikin av bóli av stóra keypihuganum. Hetta kvøldið keyptu føroysku konufólkini fyri 20.000 kr. Tað ber tí til at koma til niðurstøðuna, at leikur eru vorðnar partur av kynslívinum hjá føroyingum. Hetta er tí eitt rák, ið var vert at nema við í eini tílíkari sending, heldur Elin, ið lovar, at m.a. ein ljósreyður dildo fer at luttaka í Gourmet partinum av sendingini.

Eitt annað rák eru tær sokallaðu make-over sendingarnar, ið eru á nærum hvørjari útlendskari sjónvarpsrás, hetta verður eisini nomið við í sendingini, har onkur kendur og onkur minnið kendur fáa eitt "make over". Men hetta er bert okkurt smávegis av tí, ið verður í Káta Horninum.

Elin sigur, at sendingin ivaleyst kann provokera onkran, og at hon als ikki er fyri børn. Sendingin verður send í SVF leygarkvøldið nýggjársaftan, hon er fimm korter og byrjar kl. 22.